## Nýggj EP frá Peturi

Nú Bet You Are William skal framføra á Mini G!, Ólavsøkukonsertini/Fut í býin, Summarfestivalinum og Fjarðafestivalinum verður ein EP útgivin. EP útgávan verður einans tøk talgild á heimasíðuni hjá www.rockpipitrecords. Á útgávuni eru sangirnir, Dynasti, So long og Here we go, Stereo. Harumframt verður eitt remix frá Baby av sanginum Here we go, Stereo. Remiksið verður einans tøkt á EP útgávuni. Sagt verður í tíðindaskrivi, at EP útgávan umboðar meginpartin av tí, ið vit kunnu rokna við á endaligu útgávuni hjá bólkinum.



## Norðfra í Irma

Tað hevur eydnast føroyska Norðfra, sum framleiðir lidnar vørur úr fiski, at gera samstarv við stóru handilsketuna, Irma. Samráðingarnar við Irma byrjaðu fyri tveimum arum síðani, og seinasta árið hava vørur frá Norðfra verið at finna í diskunum hjá fyritøkuni. Nú er samstarvið víðkað, soleiðis at fiskasuppa, fiskafløk og annað frá Norðrfra er at finna í øllum handlum hjá Irma.

# Skulu vera glað fyri vit eru sterk

**Landsbankastjórin er ikki bangin fyri, at fallið á partabrøvunum í Eik Banka fær landsbúskaparligar avleiðingar**

BANKAR
*Árni Joensen: arni@sosialurin.fo*

Tá Eik Banki varð skrásett-ur á Virðisbrævamarknaðinum tann 12. juli í fjør, segði Sigurð Poulsen, landsbankastjóri og formaður í VMF, at hóast tær skrásettu fyritøkurnar vóru bara tríggjar í tali, umboðaðu tær eitt ógvuliga stórt virði. Hann legði afturat, at hetta vísti, hvussu stóran týdning hesar fyritøkur høvdu fyri føroyska samfelagið.

*Sigurð Poulsen: – Spurningurin er, um virðisfallið fer at ávirka hugin at gera íløgur í Eik Banka*



Hetta var fyri júst einum ári síðani. Men hóast virðið á partabrøvunum í Eik Banka er fallið nógv síðani, heldur landsbankastjórin, at støða bankans í samfelagnum er ikki broytt stórvegis.

-Eik Banki er líka sterkur nú sum tá, og hann hevur líka stóran týdning fyri samfelagið í dag sum tá, sigur Sigurð Poulsen. Spurdur, hví partabrøvini í Føroya Banka ikki hava verið fyri sama falli sum tey í Eik Banka, sigur landsbankastjórin, at tað er ilt at siga, men ein frágreiðing kann vera, at Eik Banki hevur størri virksemi uttanlands enn Føroya Banki.

### Vanir við sveiggj

Stjórin í Landsbankanum ásannar, at hetta er ikki ein ynskilig støða, men hann væntar ikki, at støðan verður varandi. Og hann stúrir ikki fyri Eik Banka, tí teir føroysku bankarnir eru sterkir, sigur hann.

Ein týðandi spurningur er sambært landsbankastjóranum, hvørja ávirkan tað stóra virðisfallið fær á álitið á Eik Banka. Tað eru íleggjararnir, sum eru teir stóru taparanir, men Sigurð Poulsen væntar ikki, at tað, sum er hent, fer at taka íleggjararnar av fótum.

– Føroyingar eru vanir við, at tað gongur upp og niður, og vit burdu verið før fyri at klára sveiggini í heimsbúskapinum. Samstundis skulu vít gleðast um, at trupulleikarnir ikki hava sín uppruna her hjá okkum, men aðrastaðni, og vit skulu vera glað fyri, at vit eru sterk, nú tað hendi, sigur landsbankastjórin.

# Óseriøs skriving

**Tað er burturvið, tá Børsen setir Eik Banka í bás saman við Roskilde Bank, sigur Marner Jacobsen, forstjóri**

Eik Banki er tann peningastovnurin á danska virðisbrævamarknaðinum, sum er fallin næstmest í virði, og tað fekk blaðið Børsen at sammeta Eik Banka við Roskilde Bank, sum mátti fáa hjálp frá Tjóðbankanum.



*Marner Jacobsen*

- Men tað er púra burturvið og óseriøst av Børsen, segði Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka, við útvarpið hjá Kringvarpinum.

Marner Jacobsen segði seg vera vónbrotnan av, at bankin varð tikin burturúr mongdini, uttan at viðurskiftini vóru lýst til fulnar.

- Eik Banki er avgjørt ikki í kreppu, og vit síggja avgjørt ikki stór tap fyri framman, segði forstjórin.

# Danske Bank minkaður eina helvt

Síðani Roskilde Bank kom í kreppu og mátti fáa hjálp frá Tjóðbankanum, hava danskir fjølmiðlar gjørt nógv burturúr, at tað eru serliga teir smáu bankarnir, sum hava fingið eitt bakkast. Men um hugt verður at tølunum, sæst, at tað gongur einki frægari hjá største bankanum í Danmark, Danske Bank.

Ein uppgerð hjá danska kringvarpinum vísir, at á nýggjárinum var Danske Bank 186 milliardir krónur verdur, men hesar seks mánaðirnar er virðið fallið so nógv, at tað nú er komið niður á 84 milliardir krónur. Verður dagsins virði so samanborið við virðið á bankanum fyri einum ári síðani, sæst, at virðið nú er júst helvtin av tí, sum tað var í juli í fjør. Tá var Danske Bank 164 milliardir krónur verdur.

Bankaserfrøðingurin hjá Jyske bank, Christian Hede, sigur við danska kringvarpið, at tað er ikki ov nógv sagt, at tað seinasta hálva árið hevur tað verið ein vánalig íløga at eiga partabrøv í Danske Bank. Hinvegin ber hann ikki ótta fyri, at landsins størsti banki fer at koma í kreppu, tí ein stórur partur av útlánunum, sum bankin hevur veitt, eru realkredittlán, og har hava tapini verið smá.

## Stadionætlan bíðar eftir árinskanning

**Ætlanin hjá Eiðis kommunu at byggja stadionøkið í bygdini liggur still**

KOMMUNUR
*Árni Joensen: arni@sosialurin.fo*

Í fjør samtykti bygaráðið á Eiði at fara undir at gera stadionøki niðri í Hólmanum, men ein kæra frá borgarum í bygdini steðgaði fyrireikingunum. Málið hevur verið á borðinum á Umhvørvisstovuni, hjá lokalu friðingarnevndini og er nú hjá Yvirfriðingarnevndini. Avgjørt varð, at Umhvørvisstovan skal gera eina árinskanning í sambandi við ta ætlaðu verkætlanina.

Tordur J. Niclasen, borgarstjóri, sigur, at einki hendir í stadionmálinum, fyrr enn árinskanningin er liðug og frágreiðing skrivað. Tað verður ætlandi í septembur ella oktobur, og tá fer Yvirfriðingarnevndin so at taka støðu til ætlanina hjá kommununi.

Árinskanningin kostar 180.000 krónur, og hana rindar kommunan.



*Ætlanin hjá Eiðis kommunu er at gera stadionøki her niðri í Hólmanum*

*(Mynd: Sofus D. Johannesen)*